Uttanríkis- og fiskimálaráðið

Dagfesting:	3. august 2026
Mál nr.:	26/18495-27
Málsviðgjørt:	BL-JHT
Ummælistíð:	21/7 – 25/7 2026
Eftirkannað:	27. juli 2026

Uppskot til

Løgtingslóg
um
serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026

§ 1. 750 fiskidagar verða tillutaðir ikki fult riknum útróðrarbátum, sum hava rætt til B-loyvi sambært kunngerðini um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons. Dagarnir verða tillutaðir sum felags fiskidagar.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Sambært sjófeingislógini verður fiskidagatalið ásett á hvørjum ári við kunngerð eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu. Fiskidagatalið fyri fiskiárið 2026 er ásett sambært hesi skipan við kunngerð nr. 239 frá 2025 um fiskidagar í føroyskum sjógvi í 2026.

Gongdin í nýtsluni av fiskidøgum vísir, at fiskifør í bólki 5 B væntandi fara at nýta allar tillutaðu fiskidagarnar innan stutta tíð. Endamálið við uppskotinum er at tilluta hesum bólki dagar, soleiðis at bólkurin hevur fiskidagar tøkar longur út á árið.

Uppskot verður nú lagt fyri Løgtingið við serligari heimild at tilluta bólki 5 B 750 eyka fiskidagar fyri fiskiárið 2026. Dagarnir verða tillutaðir umframt teir dagar, sum longu eru tillutaðir sambært vanligu reglunum.

Talið er ásett við støði í teimum fiskidøgum, sum vórðu fluttir bólki 5 sambært løgtingslóg nr. 191 frá 2025. Við hesi lóg var heimildin hjá landsstýrismanninum at flyta óbrúktar fiskidagar til árið eftir víðkað til eisini at fevna um bólk 5. Við støði í hesi heimild vóru óbrúktir fiskidagar tillutaðir bólki 5 við kunngerð.

Løgtingslógin varð samtykt fyrst í desember 2025, og fiskidagarnir vóru sostatt tillutaðir seint í fiskiárinum 2025. Hetta var høvuðsorsøkin til, at óbrúktir fiskidagar í 2024, sum vóru fluttir til 2025, ikki vórðu gagnnýttir.

Landsstýrismaðurin metir, at tað í hesi serligu støðu er rímiligt at tilluta bólki 5 B eyka fiskidagar, soleiðis at fiskiskapurin kann halda fram longur út á árið. Hetta lógaruppskot broytir ikki galdandi skipan fyri, hvussu fiskidagar verða ásettir sambært sjófeingislógini. Fiskidagarnir sambært hesum lógaruppskoti eru sostatt ikki partur av árliga fiskidagatalinum, sum er ásett sambært kunngerð nr. 239 frá 2025 um fiskidagar í føroyskum sjógvi í 2026.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært sjófeingislógini verður fiskidagatalið ásett á hvørjum ári við kunngerð. Ásetingin av fiskidagatalinum skal byggja á eina umsitingarætlan og veiðireglu, sum seta karmarnar fyri, hvussu fiskidagatalið verður ásett.

Ongin broyting verður gjørd í hesum reglum við hesum lógaruppskoti.

Uppskotið er ein serlig heimild at tilluta 750 eyka fiskidagar til bólk 5 B í fiskiárinum 2026. Dagarnir eru ikki partur av árliga fiskidagatalinum sambært sjófeingislógini.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at tilluta bólki 5 B 750 eyka fiskidagar í fiskiárinum 2026, so fiskifør í bólki 5 B fáa møguleika at halda fram við vinnuligum fiskiskapi longur út á árið.

Landsstýrismaðurin er varugur við, at uppskotið víkir frá tí skipan við umsitingarætlan og veiðireglu, sum annars er galdandi sambært sjófeingislógini, og at tað kunnu vera avleiðingar av at tilluta fleiri fiskidagar. Talan er tó um eina serliga og tíðaravmarkaða loysn, sum bert er galdandi fyri fiskiárið 2026, og sum ikki broytir galdandi skipan fyri áseting av fiskidagatalinum sambært sjófeingislógini. Uppskotið verður sostatt lagt fram við tí endamáli at loysa eina ítøkiliga støðu í verandi fiskiári.

Samstundis heldur arbeiðið við at eftirmeta treytirnar hjá bólki 5 og galdandi umsitingarætlan og veiðireglu fram.

Mett verður eisini, um tørvur er á broytingum í umsitingini av fiskiskapinum og undir hesum, um tiltøk skulu setast í verk, sum kunnu verja smáfisk og stuðla undir eina burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verða 750 eyka fiskidagar tillutaðir bólki 5 B í fiskiárinum 2026. Heimildin er avmarkað til fiskiárið 2026 og broytir ikki galdandi skipan í sjófeingislógini um áseting av árliga fiskidagatalinum.

Endamálið er, at fiskifør í bólki 5 B fáa møguleika at halda fram við vinnuligum fiskiskapi longur út á árið.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskot til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026 varð sent til ummælis 21. juli 2026 við hoyringarfreist til 25. juli 2026.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar, Vørn og Havstovuni. Harumframt hevur uppskotið verið tøkt á almenna hoyringarportalinum.

Ummælisviðmerkingar komu inn frá Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Meginfelag Útróðrarmanna, Havstovuni, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Føroya Ráfiskaseljarafelag, Per Mikkelsen, Felagnum Trolbátar og Suðurstreymoyar Útróðrarfelag.

Vørn hevur svarað, at tey hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

Fiskivinnuráðið boðaði frá, at ráðið ikki hevði havt stundir at viðgera málið vegna stuttu hoyringarfreistina, og at einstakir limir tí lótu sjálvstøðugar hoyringarviðmerkingar inn. Øll í Fiskivinnuráðnum, uttan umboðið fyri Feløgini hjá arbeiðsfólki á fiskavirkjum, hava sent inn skrivligar hoyringarviðmerkingar.

Øll ummælissvarini eru løgd við sum fylgiskjøl, og niðanfyri er ein stuttur samandráttur av viðmerkingunum.

Føroya Reiðarafelag tekur ikki undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður tikið aftur. Felagið vísir á, at tillutan av 750 serstøkum fiskidøgum er eitt frávik frá galdandi umsitingarætlan og veiðireglu, og at broytingar í umsitingarætlanini eiga at verða gjørdar eftir eina endurskoðan og eftirmeting, har umboð fyri allan fiskiflotan eru við. Felagið heldur, at uppskotið letur upp fyri, at einstakir skipabólkar kunnu fáa serstakar fiskidagar, tá fiskidagarnir eru brúktir, og at hetta broytir galdandi skipan, har flotin hevur lagað seg eftir fiskidagatalinum. Samstundis verður víst á, at aðrir skipabólkar hava fingið skerjingar í fiskidøgum og verið noyddir at leggja skip uttan at fáa serstakar fiskidagar, og at allir bólkar tí eiga at verða viðgjørdir undir einum. Felagið vísir eisini á, at talið av bátum í bólki 5 B er økt munandi, og at høgu fiskaprísirnir merkja, at meira eigur at liggja eftir fyri hvønn brúktan fiskidag. Harumframt verður víst á, at uppskotið kann fáa avleiðingar fyri eftirmetingina hjá ICES og arbeiðið við MSC-góðkenningum.

F**øroya Skipara- og Navigatørfelag** mælir frá at fremja lógaruppskotið. Felagið heldur, at uppskotið skeiklar skipanina.

Meginfelag Útróðrarmanna tekur ikki undir við lógaruppskotinum. Felagið vísir á, at uppskotið onga heimild hevur í sjófeingislógini, ikki samsvarar við umsitingarætlanina og er ein serlóg, ið ikki á nakran hátt samsvarar við førdan fiskivinnupolitikk. Felagið vísir eisini á, at Havstovan, feløg og aðrir bólkar í vinnuni tala at uppskotinum, at MSC-góðkenningin er møguliga í vanda, og at tað ikki er rætt at lata dagar til ein bólk, tá tað eisini mangla dagar í øðrum bólkum. Felagið vísir á, at grundgevingin, um at flyta óbrúktar fiskidagar, ikki samsvarar við veruleikan, tí allir fiskidagar í bólki 5 vórðu brúktir í 2025. Harumframt vísir felagið á, at bólkur 5 B ikki er nakað einaumboð fyri útróðrarvinnuna, nakra mentan ella yrki, men at talan í størstan mun er um frítíðarsiglarar, ið ikki hava sítt høvuðsyrki innan útróður. Sum aðrar loysnir nevnir felagið m.a. at stilla inntøkumarkið aftur, sum eyðmerkti fullrikin fiskifør og ikki fullrikin fiskifør, at luta fiskidagar í bólki 5 B í tveimum ella fleiri umførum, og at umsitingarætlanin kann gerast betri ella endurskoðast.

Havstovan mælir frá at tilluta bólki 5 B 750 eyka fiskidagar fyri fiskiárið 2026 og mælir í staðin til, at umsitingarætlanin verður fylgd. Havstovan vísir á, at tað at tilluta 750 eyka fiskidagar uttan um galdandi áseting er eitt frávik frá umsitingarætlanini, og at ein umsitingarætlan og veiðiregla bert virka eftir ætlan, um tær verða fylgdar, eisini tá ásetta fiskidagatalið er um at vera uppi. Eyka fiskidagarnir geva møguleika fyri øktari roynd og veiðu og fara tí at økja um veiðitrýstið. Havstovan vísir á, at toskastovnurin á Landgrunninum hevur verið illa fyri í nógv ár, at gýtingarstovnurin enn er undir lágmarkinum, og at veiðilutfallið er oman fyri hámarkið, sum er ásett í veiðiregluni. Í eini slíkari støðu eigur veiðitrýstið ikki at verða økt. Harumframt verður víst á, at brúktu fiskidagarnir hjá bólki 5 B hava lyndi til at økjast, tá toskurin er rak og lættliga tekur línu, og at eyka fiskidagar slík ár kunnu hava sera óhepna ávirkan á toskastovnin. Havstovan vísir eisini á, at tað at leggja 750 fiskidagar afturat til bólk 5 B í 2026 kann gerast sera óheppið fyri eftirmetingina av føroysku umsitingarætlanini í ICES, tí tað verður torført at koma við neyvum simuleringum, og uttan neyvar simuleringar er minni sannlíkt, at ICES fer at góðtaka umsitingarætlanina sum burðardygga.

Føroya Fiskimannafelag tekur ikki undir við lógaruppskotinum. Felagið vísir á, at síðan umsitingarætlanin varð gjørd í 2019, hevur hon latið upp marknaðir, sum kravdu MSC-góðkenning, serliga fyri hýsu til bretska marknaðin og upsa til Fraklands og Týsklands. Felagið kann tí ikki taka undir við, at ein ávísur bólkur í fiskidagaskipanini fær fleiri dagar, og at MSC-góðkenningin verður sett upp á spæl. Harumframt vísir felagið á, at fiskidagarnir hjá øðrum skipabólkum eru skerdir, at fleiri línuskip í bólki 3 eru løgd, og at manningar hava mist sítt arbeiði. Felagið vísir eisini á, at bólkur 2 kann missa sítt livibreyð, tí bólkurin ikki er við í roknistykkinum. At enda heldur felagið, at øll skipanin eigur at verða tikin upp til nýggja viðgerð, um summir bólkar fáa serligar dagar, og at hetta eigur at verða gjørt, áðrenn avgerð verður tikin um at lata bólki 5 B eyka dagar uttan um verandi skipan.

Føroya Ráfiskakeyparafelag mælir staðiliga frá, at uppskotið verður samtykt í verandi líki. Felagið metir, at uppskotið víkir frá grundarlagnum undir fiskidagaskipanini og vísir á, at um politiska skipanin byrjar at gera undantøk frá teimum reglum, sum umsitingarætlanin byggir á, viknar álitið á skipanina og á føroysku fiskivinnuumsitingina. Felagið vísir eisini á, at uppskotið kann hava neiligar avleiðingar fyri burðardyggu umsitingina av toskastovninum, ávirka eftirmetingina hjá ICES og arbeiðið við MSC-góðkenningini. Harumframt verður víst

á, at MSC-góðkenningin er ein av teimum týdningarmestu kappingarfyrimununum hjá føroysku fiskivinnuni, og at seta hesa í váða fyri eina stutttíðar loysn hjá einum einstøkum skipabólki kann fáa álvarsligar búskaparligar avleiðingar fyri alla virðisketuna. Felagið vísir eisini á, at fleiri aðrir skipabólkar hava góðtikið galdandi reglur, hóast tær hava havt stórar fíggjarligar avleiðingar, og at eitt serligt undantak fyri bólk 5 B kann gerast eitt fordømi, sum undirgrevur javnrættin og trúvirðið hjá fiskidagaskipanini. Felagið heldur, at orsøkin til dagatrotið í bólki 5 B er ein munandi øking í virkseminum hjá bólkinum, og at hetta í sjálvum sær ikki kann vera grundgeving fyri at broyta reglurnar aftaná. At enda metir felagið, at uppskotið ikki loysir trupulleikan, og at ein varandi loysn eigur at verða funnin í sambandi við endurskoðanina av umsitingarætlanini og veiðiregluni, heldur enn við serligum undantøkum í einstøkum fiskiárum.

Føroya Ráfiskaseljarafelag tekur ikki undir við uppskotinum.

Per Mikkelsen, sjálvstøðugur vinnurekandi, heldur, at fiskidagaskipanin eigur at verða lagað soleiðis, at hon í størri mun tekur hædd fyri ymiskum fortreytum hjá teimum, sum fiska í bólki 5, og at fiskidagarnir í størri mun koma teimum til góðar, sum hava størstan tørv á teimum.

Felagið Trolbátar vísir á, at hóast uppskotið ikki gagnar bólki 4 T, er tað jaligt, at landsstýrismaðurin ynskir broytingar í verandi fiskidagaskipan. Felagið vísir samstundis á, at umsitingarætlanin frá 2019 ikki longur verður fylgd, og at støðan í fiskidagaskipanini eigur at verða viðgjørd í síni heild heldur enn bert fyri bólk 5 B. Felagið mælir til, at Løgtingið viðger allar skipabólkar av nýggjum, og at Fiskimálaráðið heldur seg til semjuna frá 2019, so umsitingarætlanin verður betri kjølfest sum grundarlag undir fiskidagaskipanini.

Suðurstreymoyar Útróðrarfelag tekur undir við uppskotinum. Felagið vísir á, at bólkur 5 hevur fingið munandi færri fiskidagar, síðani fiskidagaskipanin varð sett í verk, uttan at hava fingið onnur rættindi, meðan aðrir skipabólkar hava fingið onnur fiskirættindi. Harumframt vísir felagið til hagtøl, sum eftir teirra meting vísa, at 750 eyka fiskidagar bert fara at geva eina veiðu á 330 tons, afturat verandi veiðu.

Landsstýrismaðurin viðmerkir, at flestu hoyringarpartar mæla frá uppskotinum og vísa m.a. á, at uppskotið víkir frá galdandi umsitingarætlan og veiðireglu, kann økja um veiðitrýstið á botnfiskastovnarnar, seta MSC-góðkenningina í vanda og gera mun á skipabólkum. Harumframt verður víst á, at dagatrotið í bólki 5 B eigur at verða loyst við broytingum í fiskidagaskipanini heldur enn við serstakari tillutan av fiskidøgum. Landsstýrismaðurin heldur kortini fast við uppskotið. Mett verður, at talan er um eina serliga og tíðaravmarkaða loysn fyri fiskiárið 2026, grundað á ta serligu støðu, sum stóðst av, at óbrúktir fiskidagar, fluttir frá 2024 til 2025, ikki vórðu gagnnýttir, tí heimildin varð samtykt seint í fiskiárinum 2025. Samstundis broytir uppskotið ikki galdandi skipan fyri áseting av fiskidagatalinum sambært sjófeingislógini, og arbeiðið við at eftirmeta treytirnar hjá bólki 5 og galdandi umsitingarætlan og veiðireglu heldur fram.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið verður mett ikki at hava beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið verður mett ikki at hava umsitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið verður mett at hava jaligar avleiðingar fyri eigarar av fiskiførum í bólki 5 B, tí teir við eyka fiskidøgunum fáa møguleika at halda fram við fiskiskapinum og avreiða veiðuna longur út á árið og fáa harvið framhaldandi inntøku frá útróðri.

Hinvegin kunnu fleiri fiskidagar føra við sær størri roynd og veiðu í bólki 5 B og harvið størri trýst á toskastovnin á landgrunninum.

Tað er tó torført at meta neyvt um, hvussu nógv fleiri fiskidagar kunnu fara at økja um virksemið hjá bólki 5 B. Tað veldst nógv um, hvussu líkindini vera til útróður, fiskiskapin, og hvussu nógv fæst fyri fiskin.

Í 2025 avreiddu bátarnir í bólki 5 B 1.066 tons av toski av landgrunninum, sum eru góð 10 prosent av samlaðu avreiðingunum av toski. Fyri stovnsrøktina hevur tað eisini týdning, at bátar í bólki 5 sambært skrásetingunum avreiða meira av smáum fiski enn hinir bólkarnir í fiskidagaskipanini. Vernd av smáum fiski er týðandi fyri burðardygga og skynsama gagnnýtslu av tilfeinginum.

Uppskotið kann eisini fáa aðrar avleiðingar.

Seinastu árini hevur vinnan miðvíst arbeitt fyri at fáa felagsskapin Marine Stewardship Council, MSC, at góðkenna fiskiskap eftir botnfiski í føroyskum sjógvi sum burðardyggan eftir krøvunum hjá MSC. Ein MSC-góðkenning ger tað vanliga lættari at sleppa inn á útflutningsmarknaðir, ið geva betri prís. Upplýst er, at MSC-góðkenningin er avgerandi fyri, at tað loysir seg hjá føroyskum virkjum at virka og útflyta upsa.

Uttanríkis- og fiskimálaráðið hevur nýliga heitt á ICES um at eftirmeta veiðiregluna fyri áseting av fiskidøgum í føroyskum sjógvi. Orsøkin er, at tey í Føroyum, sum varða av MSC-góðkenningum, hava gjørt myndugleikan varugan við, at um umsitingarætlanin og veiðireglan ikki er eftirmett av óheftum fakfólki innan næsta árliga eftirlit av MSC-góðkenningini í desember, missa tey góðkenningarnar fyri fiskiskapin eftir upsa og hýsu í føroyskum sjógvi.

Ein avgerð um at lata fleiri fiskidagar inn í skipanina, enn veiðireglan leggur upp til, kann ávirka úrslitið av eftirmetingini í ICES og arbeiðið hjá vinnuni við at fáa MSC-góðkenningar í fiskiskapi í føroyskum sjógvi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið kann hava neiligar umhvørvisligar avleiðingar. Bólkur 5 veiðir ein munandi part av toskinum í føroyskum sjógvi, og skrásetingar vísa, at bátar í bólki 5 avreiða meira av smáum toski enn aðrir bólkar í fiskidagaskipanini. At tilluta eyka fiskidagar til bólk 5 B kann tí leggja størri trýst á toskastovnin, sum framvegis er viðbrekin, tí gýtingarstovnurin í seinastu stovnsmeting varð mettur at vera undir lágmarkinum og veiðilutfallið oman fyri hámarkið, sum eru ásett í veiðiregluni.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur beinleiðis týdning fyri eigarar av fiskiførum í bólki 5 B.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið verður ikki mett at hava beinleiðis avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið verður ikki mett at hava beinleiðis avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri markaforðingar ella flytføri.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir ella panti-heimildir, og uppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi eigur at verða greitt frá teimum umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingunum av tí.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur onga nýggja heimild til eftirlit, húsarannsóknir, atgongd til virki ella privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Uppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru lýstar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Við hesi áseting verða 750 eyka fiskidagar tillutaðir bólki 5 B fyri fiskiárið 2026.

Dagarnir verða tillutaðir ikki fult riknum útróðarbátum, sum hava rætt til B-loyvi sambært kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, sum seinast broytt við kunngerð nr. 222 frá 22. desember 2025.

Fiskidagarnir eru ein serstøk tillutan, sum bert er galdandi fyri fiskiárið 2026. Hesir fiskidagar eru ikki partur av árliga fiskidagatalinum, sum verða ásettir sambært sjófeingislógini.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Uttanríkis- og fiskimálaráðið, 3. august 2026

Bárður á Steig Nielsen (sign.)
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Vørn
Fylgiskjal 2: Fiskimannafelagið
Fylgiskjal 3; Havstovan
Fylgiskjal 4: Per Mikkelsen
Fylgiskjal 5: Ráfiskakeyparafelagið
Fylgiskjal 6: Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Fylgiskjal 7: Fiskivinnuráðið
Fylgiskjal 8: Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 9: Felagið Trolbátar
Fylgiskjal 10: Meginfelag Útróðrarmanna
Fylgiskjal 11: Ráfiskaseljarafelagið
Fylgiskjal 12: Suðurstreymoyar Útróðrarfelag